# NSÍ hevur funnið miðving í Barents-havinum

**Eyðfinn Fjalsbak, sum í løtuni er við Sundabergi, hevur gjørt avtalu við NSÍ, sum hann skal umboða næsta kappingarár**

NSÍ
*Jóannes Hansen*

NSÍ hevur ikki verið so nógv at hoyrt frá í vetrarsteðginum. Flestu spælararnir fara at halda fram í felagnum, sum er eyðkent av, at nógv teir flestu spælararnir eru uppvaksnir í NSÍ, og av at fleiri rættuliga ungir spælarar eru millum teirra, sum ætlast at skula stríðast um plássini á besta liðnum hjá Trygva Mortensen.

Í vikuskiftinum visti NSÍ heimasíðan at siga, at skjótt 25 ára gamli miðvingurin, Eyðfinn Fjalsbak, nú hevur gjørt avtalu við NSÍ um, at hann skal umboða felagið hetta kappingarárið.

Eyðfinn verður kortini ikki við í fyrstu venjingunum hjá NSÍ. Góða orsøkin til tað er, at Eyðfinn er til skips við Sundabergi, sum er í Barentshavinum. Nær Eyðfinn fer at hava møguleika at venja valdast um, nær Sundaberg verður heima aftur. NSÍ heimasíðan sigur seg rokna við, at hetta fer at verða um mánaðarskiftið januar-februar.

Eyðfinn Fjalsbak spældi í fjør við MB í 3. deild. Hann hevur tó royndir í bestu deildini. Í 2001 spældi hann við HB, og fleiri av hinum seinastu árunum hevur hann spælt við FS Vágum. Eyðfinn var í síni tíð á unglingalandsliðunum. Hann hevur roynt seg á fleiri plássum. NSÍ heimasíðan sigur seg skilja, at ætlanin er at royna miðvingin og skipsmannin í høgra borði á miðvøllinum - tá ið hann kemur aftur úr Barentshavinum.

Fleyr-SÍ 3-1 (25-23, 22-25, 26-24, 25-22):

# Mótstøðan hjá Fleyr skal finnast



*SÍ gav góða mótstøðu, men enn einaferð vóru teir í Fleyr hægstir, tá finaludysturin í Mjølnir-kappingini var á skránni sunnudagin*
*Mynd: Norðlýsið*

**Fleyr vann eisini Mjølnir-kappingina, og tí verður neyðugt við nýggjum dysti, fyri at finna mótstøðuliðið hjá Fleyr til steypa-finaluna**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sørvingar mundu annars vóna, at teir kundu endurtaka kynstrið frá seinnu uppgerðini við Fleyr í grundspælinum. Ta ferðina tapti Fleyr fyri einastu ferð higartil hetta kappingarárið, men sunnudagin vóru havnarmenninir aftur omaná.

Sørvingar stríddust tó væl, og Fleyr mundu ongantíð kenna seg vísar í sigrinum, fyrr enn seinasti bólturin var vunnin. Kanska mundi triða settið vera serliga avgerandi í so máta, men hóast sørvingar høvdu kjansins, so megnaðu teir ikki at taka av hesum.

**Nýggj hálvfinala**

Fleyr vann í heyst eisini finaluna í FK-kappingini, sum Fleyr sjálvt skipar fyri. Vinnararnir í FK- og Mjølnir-kappingini eru liðini, sum spæla sjálva steypafinaluna, og tí verður nú neyðugt við nýggjum dysti, fyri at finna mótstøðuliðið hjá Fleyr til finaluna.

Tann dysturin verður millum Mjølnir og SÍ, og so verður spennandi at síggja, hvat av teimum báðum liðunum fer at dystast við Fleyr, sum í februar mánaði fyri fyrstu ferð skal royna seg í steypafinaluni.

SÍ-ÍF 0-3 (18-25, 18-25, 21-25):

# Einki oddalið í steypafinaluni

**Heldur ikki í Mjølnir-kappingini eydnaðist SÍ-kvinnunum at vinna finaludystinl, og soleiðis verða tað nummar trý og fýra á stigatalvuni, sum í februar mánaði skulu spæla steypafinaluna hjá kvinnum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

SÍ hevur uttan iva verið eitt av mest spennandi elementunum í føroyskum kvinnuflogbólti í vetur. Liðið, sum bara á øðrum ári er partur av meistaradeildini, hevur í ár staðið seg framúr væl. Við eini stammu av egnum spælarunum, sum tó er kryddað við góðum uttanhýsis styrki, hava sørvágskvinnurnar skjótt prógvað, at tær eins og menninir vilja hava eitt orð at siga í oddinum.

Í FK-kappingini vóru tær eisini partur av finaludystinum móti TB, sum tær tó taptu, men við finalusessinum í Mjølnir-kappingini høvdu tær tó enn ein møguleika at verða partur av steypafinaluni, sum kanska er størsti einstaki dagurin fyri føroyskan hondbólt.

Tað eydnaðist tó heldur hjá SÍ ikki at vinna seg fram til steypafinaluna hesaferð. ÍF, sum kanska ikki hevur havt bestu hugsandi byrjanina upp á kappingarárið, var snøgt sagt væl betri, tá finalan í Mjølnir-kappingini var á skránni sunnudagin.

Serliga í álopspartinum var ÍF væl sterkari. Tað hevði við sær, at SÍ sjáldan fekk móttøkurnar at rigga nóg væl, og so er trupult at leggja trýst á mótstøðuna.

Við sigrinum hevur ÍF altso vissað sær sætið í steypafinaluni, har TB er mótstøðuliðið. Tað vil við øðrum orðum siga, at hvørki av oddaliðunum úr Vágoynni er partur av stóra finaludegnum.

## FAKTA

**Vinnararnir í Mjølnir-kappingini vóru hesi:**

| | |
|---|---|
| **Kvinnur** | |
| Meistaradeil | ÍF |
| 1. deild | Fleyr |
| 2. deild | KÍF |
| **Menn** | |
| Meistaradeild | Fleyr |
| 1. deild | Fleyr |
| 2. deild | ÍF |

BK Tromsø-Nyborg 3-0 (26-24, 25-21, 25-19):

# Tromsø vann Konga-steypið

**Talan varð um tryggan 3-0 sigur, tá Tromsø leygardagin spældi steypafinalu móti Nyborg**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Bárður Bendix Mikkelsen kundi leygardagin eisini skriva »norskur steypavinnari« á navnaspjaldrið hjá sær. Eitt navnaspjaldur, sum undan hesum eisini taldi danska steypa- og meistaraheitið, umframt heiðursmerkini, sum hann hevur vunnið í Føroyum og við føroyska flogbóltslandsliðnum.

Saman við Rúna Weihe hevur Bárður í ár spælt við BK Tromsø í Noreg, og leygardagin vóru teir annar parturin í norsku finaluni um Kongepokalen. Ein finala, ið sum hin fyrsta varð víst beinleiðis á NRK 1, og sum tí hevði eyka prestisju við sær, so at siga.

Hóast Rúni Weihe hevði givið barsilsavboð til finaludystin, og Tromsø tí mátti vera ein av týdningarmestu spælarunum fyriuttan, so gjørdist talan um eina sanna framsýning av styrkini hjá Tromsø. Eisini hóast liðið í løtuni er beint aftan fyri Nyborg á stigatalvuni.

Fyrsta settið var tó sera spennandi. Bæði liðini fylgdust sera tætt alt settið, men tá Terje Øvergård við einum reinum servuessi sendi settið til Tromsø, tóktist hetta samstundis vera mest avgerandi bólturin í øllum dystinum.

Í øllum førum helt Tromsø í bæði næsta og triða settinum dystinum í einum jarntaki. Hóast munurin ikki gjørdist tann heilt stóri, so vóru tað alla tíðina liðfelagarnir hjá Bárði, sum hvødu munin, og tí kundi eingin muta ímóti, at talan var um ein fult uppibornan sigur.

Steypasigurin leygardagin var hin áttandi í røðini hjá Tromsø.